gult cyan magenta svart

Orðaskifti:

Hvar er nú fólkaræðið hjá okkum?

Fyrst sendu teir bræv til ST. Partur av uttanlandsnevndini sigur seg vera kunnaðan á náttartíð á Christiansborg í Keypmannahavn, meðan ein annar partur, andstøðan, als ikki er kunnaður. Síðan fingu teir svar frá ST. Deyðatøgn. Og nú senda teir bræv til Nato og biðja um at sleppa at tosa við aðalskrivaran um møguligan føroyskan limaskap í Nato ella í onkrum felagsskapi undir Nato. Framvegis deyðatøgn.

Alt hetta fer fram, uttan at uttanlandsnevnd løgtingsins rørir hond frá síðu fyri at vidgera hesi mál, sum veruliga eru stórmál. Serliga tad seinasta vid Nato. Alt hetta hendir, uttan at løgmadur rættir hond frá síðu fyri at kunna og spyrja seg til ráðs, soleidis sum okkara styrisskipan fyriskrivar. Alt hetta hendir, uttan at Føroya Løgting fær nakra kunning.

Skal andstødan tigast í hel?

Løgtingsval var í apríl 1998. Vit vóru 32, id fingu fólksins álit til at sita á Føroya Løgtingi í tí trúgv, at vit vegna Føroya fólk á samvitskufullan og skilagódan hátt vildu røkja fólksins og landsins áhugamál. Men tad, sum nú hendir er, at 18 ella kanska 19 tingmenn hava tikid sær rætt til einsamallir at greida stórmál uttan at geva hinum 13 møguleika fyri kunning ella at koma vid vidmerkingum. Vit verda hvørki kunnadir og enn minni eftirspurdir, tá tad snyr seg um ST ella Nato. Hetta er so langt úti, at eg snøgt sagt ikki eigi ord fyri tí. Somu menn, sum hava rópt seg upp á, at Føroyar skulu verda eitt rættarsamfelag, seta fullkomiliga allar fólkaræðisligar mannagongdir til viks.

Hugsid tykkum til, at tingmenn úr andstøduni, sum hóast alt vid valid umbodadu rættiliga stóran part av Føroya fólki, og sum nú kanska umboda uppaftur størri part ella kanska ein meiriluta, verda ikki virdir ein tann einasta møguleika at koma vid vidmerkingum til løgmans, nú hann hevur bidid um fund vid Nato fyri at kanna møguleikarnir fyri limaskapi. Hvussu skulu vit umboda áhugamálini hjá teimum, sum hava valt okkum?

Hava tit avskrivad henda partin av Føroya fólki, eins og tit nú hava avskrivad andstøduna sum ein part av politisku skipanini?

Sjálvt um tad er troyttandi og strævið at hoyra upp á eina andstøðu, so er eyðkenni fyri eitt demokratiskt samfelag, at hesir minnilutir verða kunnaðir og koma til orðanna. Men tað, sum vit uppliva júst nú, ja tað eru so eyðkennini fyri tey lond, sum vit í øðrum høpi als ikki vilja samanbera okkum við.

Her er fólkaræðið sett til víks.

Føroyar limast inn í Nato ella í Patrnership for Peace

Nú kenni eg svarini og viðmerkingarnar, sum fara at koma. *„Hetta var bert ein kunnandi fundur, sum løgmaður skal hava við Robertson, aðalskrivara. Tit verða kunnaðir aftaná, og sjálvandi skal Føroya Løgting viðgera málið, áðrenn ein endalig avgerð verður tikin.“*

Men leggið til merkis, hvat løgmaður sigur í brævi sínum: *„Tað er sjónarmiðið hjá landsstýrinum, at einar frælsar Føroyar eiga møguleikan fyri at søkja um limaskap í sjálvum Nato ella í øðrum lagi í Patrnership for Peace.* **“**Víðari sigur løgmaður: *„I believe this would be an excellent opportunity to discuss with you both our intentions and our options……….“* V.ø.o. ætlaði løgmaður at kjakast um **ætlanir** hjá landsstýrinum og møguleikar.

Uttan mun til um talan bert var um ein fund, so skal henda prosessin byrja eitt ella annað stað. Og søgubøkurnar høvdu skrivað, at ætlanin um føroyskan limaskap í Nato byrjaðu við einum fundi í Reykjavík millum Kallsberg og Robertson.

Hvat sigur Føroya Løgting?

Hvat er og hevur verið løgtingsins støða til Nato og aðrar verjusamgongur? Jú, tað einasta vit vita við vissu er, at Føroya Løgting hevur gjørt fleiri samtyktir um, at Føroyar skulu haldast óheftar av øllum verjusamgongum.

Tí hevði tað ikki verið annað enn rímiligt, at landsins hægsti myndugleiki slapp til orðanna ella í mista lagi varð kunnaður um hesa ætlanirnar, landsstýrið hevur.

Hvat sigur Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður til, at løgtingsins samtyktir knappliga ikki hava frægari virði enn flagið á tinghúsunum, sum varð skrætt av?

Hvat sigur føroyingurin til hesa politisku kúvending hjá Tjóðveldisflokkinum, sum einferð um árið seinastu mongu árini hevur undirhildið við einari mótmælisgongu niðan í Mjørkadal, har alt hernaðarvald varð bannað undir sand og øsku?

Og verður evran føroyskt gjaldoyra eftir sama leisti?

Eg siti í mínum stilla sinni og hugsi um, um vanligi føroyingurin kennir seg tryggan við henda einaræðishugburð, sum hetta landsstýrið er so befongt við. Um vanligi føroyingurin kennir seg tryggan við, at minnilutar og andstøða verða skúgvað til viks?

Og eitt er vist, at teir kønu, sum í hesum døgum sita og gera uppskot til grundlóg, teir hava so fingið nakað at hugsa um.

Og væl kann tað verða, at landsstýrið og samgongan fær aðra bók enn Hvítubók at lesa í.

Jóannes Eidesgaard

Aftur í Odense

Odense er ikki bara Vollsmose; men hann er við at verða ein multikulturellur býur við m.a. Vollsmose við teim mongu fólkasløgunum.

Runt um í gøtunum eru nógv tungumál at hoyra til dagligt, og vit hava valt at hetta kakofoniska kórið eisini skal hava føroyskan íblástur við boðunum: »Kom, kom til Jesus«. Hví kunnu vit ikki bert siga: »Kom, kom til Jesus« (á donskum)? Tí móðurmál er hjartamál, og tað nemur hjartastreingir á annan hátt enn onnur mál.

Við góðu tíðunum heima á landi tynnist í vinaskara og færri og færri eru um at halda um endan; men eg haldi nú at vit skulu halda á við at halda um endan. Vit kundu sagt sum unglingin við sjóverki og timburmonnum um borð á Drotningini á veg heim úr Íslandi í sekstiárunum: »Eg orki ikki meir, hví skal eg orka meir? Hvussu kann eg orka meir? – eg orki ikki meir«.

Eg haldi, at vit skulu royna at orka meir, tí tað hevur stóran týdning, at gleðiboðskapurin ljóðar á móður(hjarta)málinum, sjálvt um vit skilja danskt. Tað hevur eisini stóran týdning fyri børnini hjá okkum, at tey hoyra Guds Orð á føroyskum, og tað er eisini av týdningi, at tey síggja, at vit halda fast við henda fedranna arvin – bæði málsliga og átrúnaðarliga. Tað hevur eisini týdning fyri okkum sjálv at lesa, tosa, hoyra og syngja um Harran Jesus Kristus á tí máli, sum hann sjálvur hevur givið okkum.

Fundarfólkið í Tinghúsinum í 1888 skilti danskt; men bæði hjá teimum og okkum rørir móðurmálið hjartastreingirnar á annan hátt, og tí vildu tey »verja Førja mál og Førja siðir«. Tí fóru Dahl og Danielsen eisini undir at umsita Bíbliuna til hjartamálið, og teir gjørdu eisini sítt til, at vit hava stóran sangog sálmaskatt á móðurmálinum. Vit royna eftir førimuni at »verja Førja mál og Førja siðir« við at oysa av tí skatti, sum okkum er givin.

Vit skilja, um onkur sigur: »Jeg frydede mig, da de sagde til mig: »Vi drager til Herrens hus!«

Men tað er nakað annað at hoyra: Eg varð glaður, tá ið sagt varð við meg: »Vit skulu fara í hús Harrans!«

Vit savnast í húsi Harrans á móðurmálinum leygardagin 9. sept. kl. 15 í Pinsakirkjuni, Østergade 57, miðskeiðis í Odense.

Kennir tú onkran, sum tú hevði sett prís uppá at hoyrt Guds Orð á móðurmálinum, ber so endiliga boðini víðari.

Árni Helmsdal,
Lundekærsvej 70
5750 Odense SV
tlf. 65961373
arnihelm@post.tele.dk

Høgur livifótur, lágur livifótur! Høgt lívsvirðið, lágt lívsvirði!

Ein heldur løgin yvirskrift, men kanska verd at hugsa um eina løtu í hesum døgum, har vit so ofta verða mint á høgan og lágan livifót eins og var einki annað til í hesum heimi.

Tað er ikki vist, at tað er heilt óneyðugt at seta sær sjálvum tann spurning, um: høgur livifótur altíð er tað sama sum høgt lívsvirði. Ella um: lágur livifótur altíð er tað sama sum lágt lívsvirði.

Fyri mongum árum síðani vendi okkara framúr góði frásøgumaður Heini Olsen, verkfrøðingur úr Vestmanna, heim aftur til Føroya. Hann hevði tá verið burturstaddur í Persia-landi í so mong ár, at útvarp Føroya helt tað vera vert at fáa eitt prát í lag við Heina.

Arbeiði hansara í eysturlondum var at læra hesi fólk at gera vesturlendskar vegir og brýr, og hetta var teimum kærkomin læra.

Ein av spurningunum, ið útvarpið setti Heina var, hvat hann helt um hesi fólk, hann nú hevði verið ímillum so leingi. »Tey eru øðrvísi enn vit, og hugsa øðrvísi enn vit«. Eg helt meg ikki skilja á svari hansara, at tey av teirri orsøk vóru verri menniskju enn vit. Tey vóru bæði blíð og glað.

Ein annar spurningur til Heina var, um hann legði merki til nakra broyting í Føroyum, eftir hesi mongu ár, hann hevði verið burturstaddur. Jú tað helt hann. Her var mikið hent. Nógv stór og vøkur fiskiskip vóru komin til landið. Vegir og bryggjur vóru eisini broytt og síðan stór og flott hús. Livifóturin sjeýdist eisini vera nógv hækkaður men, legði hann afturat: Størsta broytingin, ið hann enn var komin fram á, vóru allir hesir feitu mennirnir og hesir stóru búkarnir.

Fyrr visti man, at tað vóru einir fimm ella seks væla búkar í øllum Føroyum. Tað hevur so svarað til umleið ein tílíkur búkur uppá hvørt sýsli, men nú vóru fleiri í hvørjari bygd.

Nú er so spurningurin um okkara hækkaði livifótur altíð er tað sama sum hækkað lívsvirði?

9. august í ár 2000, visti eitt av tíðindabløðum okkara at siga at 1,1 milliard menniskju viga meira enn lækni teirra kann viðmæla. Tey doyggja av fiti. Men eitt var vist, fer tað nú at vera so vorðið hereftir, at hvør grindamaður skal hava ein heilan grindahval í sín part, hvørja ferð, ið grind leggur beinini, so er ikki at vænta, at búkarnir gerast minni. Líka so vist man vera, at fleiri eru tey, ið ynskja bæði heming og tvøstsnert á hesar grinda hamstrarar, og tað økir ikki um lívsvirði.

Tó er ilt at meta um, hvat tey ymsu halda, tí fyri summum tykist munurin ikki at vera so stórur, um talan er um eina góða spikfjós ella okkara móðurmál.

Hvør kundi eitt nú minst til, at nakar týðandi føroyskur politikari heldur tað vera heilt náttúrligt og enntá frægt ist um, at altjóða felagsskapurin S.T. ikki virðir Føroya Landsstýri so frægt, at teir hirða at svara einum náttúrliga settum skrivligum spurningi?

Og hvør kundi minst til, at fleiri føroyingar halda tað vera eina vælagerð, at danir nú ár 2000 lýsa fyri alheimstjóðum, at føroyingar er eitt minnilutamál í danska ríkinum? Nei, her átti mangur maður heldur at tára, og hetta tykist bæði óhugnaligt og óskiljandi.

Ikki vóru skaldini bæði Fr. Petersen og Jóannes Patursson altíð samdir á tí politiska vígvøllinum, men hygg her, hvussu samdir teir vóru í málsspurninginum.

Fr. Petersen yrkti:
O, móðurmál, stórt er títt fall
úr tínum ærustóli,
fyrr virdu allir teg sum jall
í tínum egna bóli

teir róku teg av kirkju út
og aftur burt av tingi;
tú mátti liva við sorg og sút–
so hevur lív títt gingið.

Jóannes Patursson yrkti:
Nei, teir skjóta fyri stokk og slá,
og har torir eingin at herja á.

Í Havnar skúla har er so trongt,
at móðurmáli er útistongt.

Hvørgin av hesum monnum helt tað verða gott, ei heldur rætt. Men aftur hesu ferð glitrar posin við lokkubitunum úti í havsbrúnni. Nú verður kunngjørt á danatingi, at tit føroyingar skulu í ár fáa 25 milliónir frá okkum í stuðli. (Eru teir kanska ikki fittir?)

Eg fari at enda greinastubban við einum ørindi frá einum triðja skaldi okkara J. Dahl:

Og eiga tit kærleika til móðurlands,
lat kærleikan sýnast í verki!
Og eigum vær trúgv, so stígum fram,
og móðurmál veri várt merki!

Sjúrður Poulsen

Menningartarnað taka sakina í egnar hendur

Javni hevur hesar seinastu tríggjar dagarnar skipað fyri skeiði, sum serliga er ætlað menningartarnaðum, har tey skulu læra at taka ábyrgd

Stefan í Skorini

Endamálið við skeiðnum er, at læra tey menningartarnaðu at taka ábyrgd av egnari lagnu fyri eisini at fáa ávirkan á sítt egna lív.

Tað er Jóna Dahl, sum er fyrireikari av skeiðnum. Hon fekk hugskotið um eitt slíkt skeið í Føroyum, tá hon var á líknandi skeiði niðri í Danmark. Har kom hon í samband við nakrar av serfrøðingunum á økinum, sum vóru áhugaðir at koma hendavegin at hava eitt skeið fyri menningartarnað.

Hetta er fyrstu ferð, at Javni skipar fyri einum slíkum skeiði í Føroyum, og Jóna Dahl heldur avgjørt, at tørvur er á einum skeiði fyri menningartarnað í Føroyum.

Menna menningartarnað

Fyrireikararnir vilja við hesum tiltakinum menna tey menningartarnaðu í tann mun, at tey sjálv eru ment at taka eina ávísa ábyrgd fyri sínum egna lívi.

- Á hesum økinum er vit heilt einfalt eftirbátur í mun til hini Norðurlondini, sum vit sammeta okkum við, sigur Jóna Dahl.

Tað eisini tíð uppá, at hetta evnið verður tikið upp hjá bæði menningartarnaðum og teirra stuðlum.

Tí er hetta skeiðið eisini fyri hjálparfólk, sum dagliga arbeiða við og taka sær av menningartarnaðum. Tey skulu eisini læra at taka tey menningartarnaðu við uppá ráð, tá avgerðir skulu takast, sum snúgva seg um teirra viðurskifti.

Her heldur Jóna, at tað kanska er neyðugt við eini hugburðsbroyting millum starvsfólk á heimum fyri menningartarnað, tí tað hevur ikki verið vanligt at lata tey menningartarnaðu taka avgerðir í tann mun, sum hetta skeiðið leggur upp til. Tí eru starvsfólkini eisini ein týðandi partur av skeiðnum, men tað er tó fyrst og fremst fyri tey menningartarnaðu.

Skeiðleiðararnir leggja dent á at læra tey menningartarnaðu at taka ábyrgd fyri egnum viðurskiftum og fáa ávirkan á teirra lív. Tey menningartarnaðu mugu eisini læra, at tað er teirra ábyrgd, at teirra ynskir verða framborin og førd út í lívið. Tað er ikki okkurt hjálparfólk ella onkur stuðul, sum skal syrgja fyri, at tey fáa teirra vilja.

– Eg tori betur at siga mína meinging uttan at vera bangin fyri, hvat onnur halda, sigur Berit Abrahamsen, v.m., sum er ein av skeiðluttakarunum. Jóna Dahl h.m. er ein av fyrireikarunum av skeiðnum

Mynd. Jens Kr. Vang

Búgva á vallaraheiminum

17 menningartarnað eru á skeiðnum, og tey eru millum 25 og 60 ára gomul. 14 av teimum búgva á Vallaraheiminum Tórshavn hjá Smyril Line við Oyggjarvegin. Hetta er ein liður í skeiðnum, sum hevur til endamáls at geva teimum ábyrgd.

Tey búgva tvey saman á hvørjum kamari. Eingin stuðul býr saman við teimum, meðan tey búleikast á Vallaraheiminum. Hetta er eisini fyrstu ferð, at tey hava fingið møguleikan at búgva soleiðis einsamøll uttan eftirlit.

Tey hava sínar uppgávur á Vallaraheiminum, sum tey skulu røkja hvønn dag. Jóna Dahl sigur, at tey hava megnað hesar uppgávur til fulnar, og eingir trupulleikar hava verið.

Á henda hátt kunnu tey læra at hava ábyrgd.

Skeiðið er allan dagin frá mikudegnum og tríggjar dagar fram. Um kvøldið fáa tey uppgávur, sum tey skulu loysa saman í bólkum, og úrslitið verður lagt fram um morgunin. Hetta er eisini ein liður í menninguni.

Glað fyri skeiðið

Skeiðluttakararnir eru sera glaðir fyri skeiðið og eru eisini spentir um, hvussu hetta fer at rigga aftaná, tá gerandisdagurin byrjar aftur sum vant.

Berit Abrahamsen er ein av skeiðluttakarunum, og hon sigur seg hava fingið nógv burturúr skeiðnum. Eg havi longu fingið betri sjálvsálit, og tað er gott, sigur Berit.

- Eg tori eisini betur at siga mína meining uttan at vera bangin fyri, hvat onnur halda. Tað er ofta so, at tey, sum eru rundanum, taka ein av ræðið, greiðir Berit frá.

- Mær dámar sera væl og havi eisini fingið nógv burtúr skeiðnum.

Ætlanin við skeiðnum er eisini, at tey menningartarnaðu kunnu sleppa undan at stríðast ov nógv við at sleppa til orðanna, og tað eiga tey eisini at verða betur før fyri eftir skeiðið.

Á skeiðnum hava tey gjørt hvør sína plakat, har tey hava myndir av familjuni, arbeiðsplássinum og øðrum, sum hava ein leiklut í teirra lívi. Á hesi plakatini hava tey eisini sett nøkur ay teirra ynskjum fram. Á henda hátt kunnu tey læra, at bera fram teirra ynskir, sum er ein týðandi partur av skeiðnum.

Kontaktnevndin

Javni setti í 1994 eina kontaktnevnd við fimm menningartarnaðum. Henda nevndin skuldi vera bindiliðið millum Javna og tey menningartarnaðu, men henda nevndin hevur ongantíð virkað, sum hon skal.

Í sambandi við hetta skeiðið, har tey menningartarnaðu skulu hava meira ávirkan, er ætlanin, at fáa gongd á aftur hesa nevndina. Við hesi nevndini skulu tey menningartarnaðu verða betur hoyrd, sum skeiðið eisini leggur upp til. Hetta skal eisini verða ein partur av niðurstøðuni eftir skeiðið.

Úr Danmark eru komnir tveir konsulentar og tvey foreldur. Annar av konsulentunum er Frank Ulmer Jørgensen, sum eisini hevur havt fyrilestur á Hotel Hafnia um menningartarnað við sálarligum breki.

Frank Ulmer Jørgensen, sum er annar av skeiðleiðarunum, starvast hjá LEV, sum er danska felagið fyri menningartarnað.

Seinasti dagur verður í morgin, og tá fara tey eisini at taka samanum og koma fram til eina niðurstøðu.

Skeiðluttakararnir hava seinastu tríggjar dagarnar lært, hvussu tey kunnu taka ábyrgd av sær sjálvum og fáa teirra ynski førd út í lívið

Mynd. Jens Kr. Vang